SEV

# Elverkfrøðingur ella tilsvarandi søkist til veikstreyms- og eltøkniøkið hjá SEV

**Kanst tú lofta við fleiri bóltum samstundis?**
**Kanst tú geva títt íkast til okkara stýringsteknisku konstruktiónir?**
**Kanst tú arbeiða undir trýsti og hava yvirarbeiði í avmarkaða tíð í senn?**
**So ert tú tann, vit sóknast eftir.**

Ein elverkfrøðingur ella umsøkjari við aðrari tilsvarandi útbúgving, og við stórum áhuga innan stýringar, hevur møguleikan at fáa eitt spennandi og til tíðir krevjandi arbeiði í einum felagi í stórari menning innan eltekniska økið.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltekniska útbúnaðinum á elverkum og koblingsstøðum kring landið.

Tú má hava góð samstarvsevnir og kunna málbera teg bæði í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum.

**Tínar uppgávur umfata m.a.**
· Projektering, menning, dokumentering, test og viðlíkahald av stýringum.
· Programmering og seta í verk PLC , HMI og fjarstýringstøkni.
· Projektering av lágspenningsstalvum.

**Sum umsøkjari til starvið hevur tú fyrimun, um tú:**
· Hevur royndir innan eitt ella fleiri av hesum økjum: Automatión, HMI, elprojektering, eldokumentatión, instrumentering og mátiteknikk.
· Hevur eina handverksliga grundútbúgving innan el.
· Hevur evnir og áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða tær:**
· Eitt sera fjølbroytt arbeiði, har tú hevur møguleika at vera við frá menning til íverksetan.
· Eitt arbeiði, sum tú sjálvur er við til at tilrættaleggja.
· Møguleika fyri persónligari og fakligari menning.
· Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har samstarv og smidleiki verður hámett.

**Lønin:**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Verkfrøðingafelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Klæmint Weihe, stjóra ella Terja Nielsen, deildarverkfrøðing á telefon 346800.

Umsóknir skulu saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum sendast Elfelagnum SEV, postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi **mikudagin, 17. august 2005**.

Sosialurin 341800

**Elfelagið SEV:**
*Felagið, tú fert at arbeiða hjá, er interkommunala Elfelagið SEV, sum tekur sær av at streymveita allar Føroyar frá og við elframleiðsluni og til endaliga brúkaran. SEV hevur uml. 150 fólk í starvi og á deildini, har tú fert at arbeiða, eru frammanundan 2 verkfrøðingar og 3 montørar.*

P/F ALMA MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Neyðventilation / flytan av luft - Vortex**
Høgt trykk (560 Pa) og 3600 m3 um tíman.
Slanga kann setast til (305 mm).
Kann millum annað brúkast til ventilatión -
- aftaná eldsløkking.
- at turka bygningar.
- tá arbeitt verður í tangum.
- tá arbeitt verður við vandamiklum evnum.
Slanga til Vortex: 7,6 mtr. Kr. 4.750,- við mvg.

**Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn**
**Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo**

Kr. 7.350,- við mvg.

KAMPANJUAVSLÁTTUR UPP TIL
45.000 KR
VOLVO FOR LIFE
VR BILAR

www.sosialurin.fo

**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA

Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

# BARRVØRÐUR

## Hotel Hafnia søkir barrvørð at byrja skjótast gjørligt

**Førleiki**
» Barrskeið ella royndir innan yrkið
» Fyrikomandi og tænastusinnaður
» Góð samstarvsevnir og fleksibul
» Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
» Teldukunnleiki er ein fyrimunur

**Starvið**
» Fáa gestir at kenna seg væl
» Seta sín dám á umhvørvið
» Bíleggja vørur
» Samskipa ymisk tiltøk

**Vit bjóða**
» Eitt áhugavert og spennandi starv
» Góðar arbeiðsumstøður
» Skiftistíð – frí annað hvørt vikuskiftið
» Førleikamenning
» Løn eftir avtalu

Umsókn, við avriti av prógvum og ummælum, skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 – 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. august 2005



**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.



*Hotellið í miðbýnum* ★★★★

HOTEL HAFNIA

# Mylnuhúsið

## søkir eftir 2 pedagogum

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur, ið dagliga tekur ímóti 140 børnum í aldrinum 0 - 9 ár.
Vit hava vøggustovu, barnagarð, útibarnagarðar og frítíðarskúla.

Vit leggja stóran dent á at arbeiða út frá tí børnini eru hugtikin av og leggja vit dagin til rættis eftir tí.
Tað er av stórum týdningi at "lívskuffertið" hjá barninum verður tikið í størsta álvara.
Les meira á www.mylnuhusid.fo

**Vit søkja eftir fólki til:**
útibarnagarð 40 tíma viku
frítíðarskúla 30 tíma viku

**Vit ynskja okkum fólk sum:**
· eru fleksibul
· eru opin fyri nýhugsan
· kunnu stuðla við góðum samstarvi á einum stórum stovni.
· hava hug at arbeiða *saman* við børnum.

**Vit bjóða:**
· eitt Mylnuhús í menning
· eitt Mylnuhús við nógvum børnum og vaksnum
· eitt Mylnuhús við góðum foreldra- og samstarvsfelagum
· eitt Mylnuhús har tað er pláss fyri, at bæði børn og vaksin kunnu seta síni "spor"

Størvini eru at seta 15. august 2005 ella skjótast tilber, um ongin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett í fyribilsstarv.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Føroya Pedagogfelag og kommunurnar.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðaran Hanna Thøgersen tlf. 217789

Umsóknir til størvini, saman við útbúgving og royndum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagið mikudagin 3. august 2005.

Mylnuhúsið
Mylnugøta 10 · 700 Klaksvík
mylnuhusid@mylnuhusid.fo